# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Føroya Læraraskúli:

## 17 leiðarar fingið prógv

**Mikudagin 13. apríl 2005 fingu 17 leiðarar prógv í samskifti, skipan og leiðslu (SSL) á Føroya Læraraskúla. SSL er ein grundleggjandi útbúgving, serliga ætlað fólki í leiðslustørvum í almennu fyrisitingini. Hetta er fimti flokkur, ið fær SSL-prógv á Føroya Læraraskúla**



*Leiðararnir sum fingu prógv eru f.v.: Gitta av Kák, Irena Olsen, Fríðgerð Sundskarð, Rosa Prestá, Poula Eidesgaard, Hannemi á Brúgv, Turið Horn, Elin Reinert Planck, Elin Mikkelsen, Eyðun Gaard, Karin Jacobsen, Elspa Petersen, Eyðbjørg Joensen, Anna Maria Antoniussen, Sofía Nattestad, Rósey Reynstind, og Ann Jacobsen. Á myndini eru eisini Christian Mathiasen og Kirsten Gammelgaard, lærarar, Henrik Kenstrup Petersen, próvdómari, og Pauli Nielsen, rektari á Føroya Læraraskúla*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Havnar leksikon:

## Fólkatónleikarabólkurin "The Rabbits"

**Næstu ferð hava vit mynd frá 1927 av jazzorkestrinum "Triumf"**

**Í sambandi við 60-ara vikuskiftið hava vit hesaferð valt at taka eina mynd av einum fólkatónleikarabólki frá 60-unum**

Fólkatónleikarabólkurin "The Rabbits" varð stovnaður í 1966. Nakrar útskiftingar vóru í bólkinum upp gjøgnum árini, og myndin vísir manningina í bólkinum árini 1966-67.

Tey eru: f.v.: Petur Ove Petersen, Heri Kragesteen, Marius Joensen, Fróði Sandoy og Lív Dam .

The Rabbits var uttan iva best klingandi fólkatónleikarabólkur í Føroyum nakrantíð. Teirra tónleikur var fyri tað mesta at líkna við australska fólkatónleikarabólkin "The Seekers".

Um onkur av lesarum okkara hevur okkurt at viðmerkja í hesum sambandi, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon: 314647 / 273168.

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

